NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2017

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 3 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING 2017 | s. | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2017 | s. | 7 |
| FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI 2017 | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | s. | 9 |
| SOLVENSUPPGERÐ | s. | 10 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 11 |
| NOTUR | s. | 12 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2017 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2017.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 24. juli 2017.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>*formaður* | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Karl Heri Joensen | Petur Alberg Lamhauge | Frimodt Rasmussen |
| Guðrið Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker | Janus Joensen |

# Hálvársfrágreiðing 2017

## Fyrra hálvár í stuttum

- Avlop eftir skatt 8,1 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt 3,8 %
- Útlánini øktust 2,4 %
- Innlánini øktust 3,2 %
- Ábyrgdarfæið øktist 8,2 %
- Útlánsprosentið 81 %
- Gjaldførisyvirdekningurin (§ 152) 188 %
- Solvensurin 18,3 %
- Solvenstørvurin 9,3 %
- Solvensyvirdekningurin 9 %-stig

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og eisini eina holla, professionella ráðgeving.

## Gongdin fyrra hálvár 2017

Úrslitið eftir skatt var eitt avlop á 8,1 mió. kr. samanborið við 9,6 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein lækking upp á 1,5 mió. kr., ið stavar frá lægri avlopi av virðisjavnan av lánsbrøvum. Eginognin rentaði við 3,8 % fyrra hálvár og er nú 218 mió. kr.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 7,2 mió. kr. móti 7,5 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein minking í vanliga rakstrinum upp á 0,3 mió. kr.

Sparikassin hevur sum mál at vera kappingarførur og sæst hetta eisini aftur í roknskapinum, har út- og innlán øktust ávikavist 2,4 % og 3,2 %. Rentustøðið er framvegis á sera lágum støði og til at fíggja kappingina um kundarnar hevur sparikassin tillagað rentuna fyrra hálvár. Meginparturin av hesi tillaging, saman við økta virkseminum hjá sparikassanum, fær ikki fullan virknað fyrr enn í roknskapinum fyri seinna hálvár.

Á umboðsráðsfundinum í mars í ár samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri árið 2016 við 5 prosentum. Sparikassans politikkur fyri 2017 er, at árliga rentan á ábyrgdarpeningi framvegis verður 5 prosent. Ábyrgdarar kunnu í mesta lagi eiga kr. 300.000 í ábyrgdarpeningi, uttan at loyvi krevst frá nevndini. Fyrra hálvár er ábyrgdarpeningurin hækkaður við 1,5 mió. kr., ið svarar til eina øking á 8,2 %.

Fíggjareftirlitið hevur tann 29. juni 2017 endurútnevnt sparikassan til at vera serliga týðandi peningastovnur í Føroyum. Grundað á sparikassans virksemi verður sparikassin mettur at hava so mikið stóran týdning fyri samfelagið, at hann er endurútnevndur sum týðandi peningastovnur – sonevndur SIFI-peningastovnur. Harvið eru serlig krøv áløgd sparikassanum til kapital og gjaldføri v.m., ið skulu tryggja sparikassan uppaftur betri.

Gongdin í fyrra hálvári hevur sum heild verið í samsvari við metingar sparikassans, og samanumtikið er sparikassin væl nøgdur við gongdina.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 33,3 mió. kr. í mun til 32,4 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Tað er ein øking upp á 0,9 mió. kr. Kappingarstøðan og lága rentustøðið leggja trýst á rentuinntøkurnar, men vegna tillaging av rentuútreiðslum, hevur sparikassin megnað at økt um netto rentuinntøkurnar við 0,9 mió. kr. Kostnaðar- og provisjónsinntøkur eru á sama støði sum fyrra hálvár 2016.

### Virðisjavnan

Virðisjavnin vísir eitt avlop upp á 1,2 mió. kr. sammett við 2,6 mió. kr. sama tíðarskeið undanfarna ár. Tað er ein lækking á 1,4 mió. kr. Høvuðsorsøkin til avlopið er virðisjavnan av lánsbrøvum vegna lækkandi rentustøði. Haraftrat hevði sparikassin avlop av virðisjavnan av óskrásettum partabrøvum upp á 0,1 mió. kr. Sparikassin eigur bert partabrøv í Elektron, SDC og DLR Kredit, sum øll eru feløg, sum sparikassin samstarvar við.

### Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslurnar til starvsfólk og fyrisiting hækkaðu úr 24,9 mió. kr. upp í 25,8 mió. kr. Hækkingin upp á 0,9 mió. kr. stavar frá hægri útreiðslum til lønir og sosialar veitingar, sum øktust við 0,5 mió. kr., og útreiðslum til fyrisiting, sum øktust við 0,4 mió. kr. Samlaða talið av ársverkum fyrra hálvár í ár var 42,7 og er óbroytt í mun til sama tíðarskeið í fjør.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Hesin postur fevnir um gjald til Innskjótaratrygdargrunnin (Garantiformuen) og útgjald úr gávugrunninum, sum fyrra hálvár var 13 tkr. Nýggj skipan fyri innskjótaratrygd er sett í verk í Danmark í 2015 og væntast at verða sett í gildi fyri Føroyar seinni í ár. Gjaldið eftir hesi skipan væntast at verða munandi lægri.

### Niðurskrivingar

Fyrra hálvár í ár niðurskrivaði sparikassin útlán og ábyrgdir við 0,3 mió. kr., sum er 0,2 mió. kr. minni í mun til fyrra hálvár í fjør, tá ið niðurskrivingarnar vóru 0,5 mió. kr. Sparikassin hevur framt stórar niðurskrivingar seinastu árini, men gongdin í niðurskrivingum seinasta árið ber boð um, at útlit eru fyri, at niðurskrivingarnar komandi árini fara at verða á einum lægri støði í mun til undanfarin ár.

Nýggjar niðurskrivingarreglur verða settar í gildi 1. januar 2018, ið taka støði í nýggja roknskaparstandardinum IFRS 9. Við IFRS 9 verða galdandi niðurskrivingarreglur, ið eru grundaðar á staðfest tap, broyttar til at taka støði í væntaðum tapum. Í løtuni er trupult at meta um ávirkanina av IFRS 9, men væntað verður, at samlað sæð fyri allar peningastovnar verður talan um øktar niðurskrivingar. Víst verður til notu 1 í ársfrásøgnini fyri 2016.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøða sparikassans øktist við 79 mió. kr. 1. hálvár 2017, úr 2.372 mió. kr. og upp í 2.451 mió. kr. Hetta svarar til eina øking upp á 3,3 %. Høvuðsorsøkin til vøksturin í fíggjarstøðuni er økta virksemið hjá sparikassanum, har út- og innlán øktust ávikavist 2,4 % og 3,2 %. Innlánini øktust við 67 mió. kr., úr 2.119 mió. kr. við árslok 2016 og upp í 2.187 mió. kr. 1. hálvár 2017. Útlánini øktust við 41 mió. kr., úr 1.694 mió. kr. við árslok 2016 og upp í 1.735 mió. kr. 1. hálvár 2017.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Fyrra hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til lógarkravið 188 % ímóti 176 % við ársenda í fjør - hetta er ein øking uppá 12 %-stig. Sambært eftirlitsdiamantinum hjá Fíggjareftirlitinum er minstamarkið fyri yvirdekningi 50 %.

## Solvensur og solvenstørvur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Fyrra hálvár í ár var solvensurin 18,3 % í mun til 18,1 % somu tíð í fjør.

Solvenstørvurin var uppgjørdur til 9,3 % pr. 1. hálvár 2017 í mun til 9,1 % somu tíð í fjør.

Sostatt hevur sparikassin ein solvensyvirdekning pr. 1. hálvár 2017 upp á 9 %-stig, sum er á sama støði sum árið fyri.

## Meting fyri 2017

Fyrra hálvár 2017 var avlopið 7,2 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Inntøkurnar fyri 2. hálvár verða mettar at verða á einum hægri støði enn 1. hálvár, og væntað verður, at tillagingar í rakstrinum 1. hálvár fara at síggjast aftur í rakstrinum 2. hálvár.

Í ársfrásøgnini fyri 2016 varð mett, at úrslitið fyri alt árið 2017 fór at vera eitt avlop av vanligum rakstri upp á umleið 18 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Grundað á kappingina um útlánskundarnar og lága rentustøðið er sparikassin av tí fatan, at úrslitið fyri 2017 verður umleið 16 mió. kr.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er ein stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar tilsamans** (skulu vera minni enn 125 % av kapitalgrundarlagnum): Stórir kundar tilsamans pr. 30. juni 2017 eru uppgjørdir til 37,7 % av kapitalgrundarlagnum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið): Sparikassin hevði fyrra hálvár í 2017 ein útlánsvøkstur upp á 2,4 %.
- **Útlán og ábyrgdir til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av útlánum og ábyrgdum tilsamans): Pr. 30. juni 2017 vóru útlán og ábyrgdir sparikassans til fastognir 7,1 % av samlaðu útlánunum og ábyrgdunum.
- **Fíggjarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1): Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,7 pr. 30. juni 2017.
- **Gjaldførið yvir lógarinnar kravi** (skal vera størri enn 50 %): Sparikassin hevur pr. 30. juni 2017 uppgjørt gjaldførið yvir lógarinnar kravi til 188 %.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2016.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30. juni 2017 hava ongar hendingar verið, sum ávirka fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum er nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti 1. hálvár 2017. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2016.

# Rakstrarroknskapur 1. hálvár 2017

| Nota | | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 32.973 | 34.143 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 3.369 | 5.483 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **29.604** | **28.660** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 0 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 3.987 | 3.997 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 275 | 255 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **33.316** | **32.402** |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 1.167 | 2.611 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 430 | 716 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 25.835 | 24.949 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 720 | 666 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 13 | 25 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 282 | 480 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **8.063** | **9.609** |
| | Skattur | 0 | 0 |
| | **Hálvársúrslit** | **8.063** | **9.609** |

# Fíggjarstøða hin 30. juni 2017

| Nota | | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 56.047 | 49.756 | 54.114 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 84.835 | 58.440 | 81.920 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.735.089 | 1.645.581 | 1.694.210 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 507.144 | 455.003 | 462.048 |
| 7 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 5.010 | 10.121 | 10.054 |
| | Partabrøv o.a. | 12.045 | 11.521 | 12.325 |
| | Fastognir íalt | 23.792 | 21.748 | 23.284 |
| | Íløguognir | 8.521 | 7.566 | 8.521 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 15.271 | 14.182 | 14.763 |
| | Aðrar materiellar ognir | 7.620 | 7.819 | 8.017 |
| | Útsett skattaáogn | 5.400 | 5.400 | 5.400 |
| | Yvirtiknar ognir | 10.100 | 17.115 | 9.262 |
| | Aðrar ognir | 4.299 | 3.754 | 11.542 |
| | Tíðaravmarkingar | 0 | 0 | 0 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.451.381** | **2.286.258** | **2.372.176** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 282 | 0 | 0 |
| | Innlán | 2.186.545 | 2.040.196 | 2.119.321 |
| | Onnur skuld | 18.887 | 14.418 | 15.861 |
| | Tíðaravmarkingar | 261 | 323 | 282 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.205.975** | **2.054.937** | **2.135.464** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.025 | 2.116 | 2.025 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 93 | 93 | 93 |
| | Aðrar avsetingar | 0 | 0 | 0 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.118** | **2.209** | **2.118** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **25.500** | **25.500** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 19.580 | 17.331 | 18.091 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 189.746 | 176.272 | 176.673 |
| | Úrslit eftir skatt | 8.063 | 9.609 | 13.073 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 857 |
| | Gávugrunnur | 400 | 400 | 400 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **217.789** | **203.612** | **209.094** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.451.381** | **2.286.258** | **2.372.176** |

8 Aðrar skyldur

# Útgreining av eginpeningi

| | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 18.091 | 16.470 | 16.470 |
| Tilgongd | 1.536 | 1.108 | 1.896 |
| Frágongd | -47 | -247 | -275 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **19.580** | **17.331** | **18.091** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 189.746 | 176.271 | 176.271 |
| Flutt frá gávugrunni, brúkt í árinum | 13 | 0 | 400 |
| Flutt úrslit | 8.063 | 9.609 | 13.073 |
| Regulering renta undanfarin ár | 0 | 0 | 2 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **197.822** | **185.881** | **189.746** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 857 |
| Gávugrunnur | 387 | 400 | 400 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **217.789** | **203.612** | **209.094** |

# Solvensuppgerð

| | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| Eginpeningur | 217.789 | 203.612 | 209.094 |
| Hálvársúrslit | -8.063 | -9.609 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -857 |
| Varslig meting av dagsvirði | -539 | -474 | -483 |
| Aktiverað skattaaktiv | -5.400 | -5.400 | -5.400 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **203.787** | **188.129** | **202.354** |
| | | | |
| Eginpeningur | 217.789 | 203.612 | 209.094 |
| Hálvársúrslit | -8.063 | -9.609 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -857 |
| Varslig meting av dagsvirði | -539 | -474 | -483 |
| Aktiverað skattaaktiv | -5.400 | -5.400 | -5.400 |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 25.500 | 25.500 |
| **Kapitalgrundarlag aftaná frádrøg tilsamans** | **229.287** | **213.629** | **227.854** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.254.152 | 1.178.517 | 1.194.838 |
| Solvensprosent | 18,3 | 18,1 | 19,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,2 | 16,0 | 16,9 |
| | | | |
| **Uppgerð av solvenstørvi eftir kredittavsetingarháttinum** | | | |
| Kredittváði | 9.434 | 10.756 | 9.293 |
| Marknaðarváði | 3.305 | 882 | 2.138 |
| Operationellur váði | 0 | 0 | 0 |
| Annar váði | 3.097 | 1.498 | 3.490 |
| Lógarkrøv | 100.332 | 94.281 | 95.587 |
| **Solvenstørvur tilsamans** | **116.168** | **107.417** | **110.508** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 9,3 | 9,1 | 9,3 |
| Solvensyvirdekningur (%-stig) | 9,0 | 9,0 | 9,9 |
| Solvensyvirdekningur (%) | 97 | 99 | 107 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 | 1H 2014 | 1H 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 18,3 | 18,1 | 18,1 | 18,7 | 18,3 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,2 | 16,0 | 15,9 | 16,5 | 18,3 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,8 | 4,8 | 3,4 | 4,3 | 4,3 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,8 | 4,8 | 3,4 | 4,3 | 1,5 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,3 | 1,4 | 1,2 | 1,3 | 1,2 |
| Rentuváði | 2,8 | 3,3 | 2,9 | 1,7 | 3,0 |
| Gjaldoyrastøða | 0,4 | 0,3 | 0,3 | 0,7 | 0,3 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 80,9 | 82,4 | 85,0 | 88,0 | 93,3 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 188,0 | 169,0 | 154,1 | 199,6 | 143,8 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til kapitalgrundarlag | 37,7 | 46,3 | 50,0 | 39,5 | 56,3 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 1,8 | 2,0 | 2,6 | 2,8 | 3,2 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | 0,0 | -0,1 | 0,1 | 0,1 | 0,3 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 2,4 | 3,0 | 0,8 | 0,6 | 2,5 |
| Útlán í mun til eginpening | 8,0 | 8,1 | 8,4 | 8,9 | 9,4 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 | 1H 2014 | 1H 2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | |
| Netto rentuinntøkur | 29.604 | 28.660 | 28.408 | 31.060 | 32.810 |
| Netto kostnaðarinntøkur | 3.712 | 3.742 | 4.838 | 3.206 | 2.376 |
| Virðisjavnan | 1.167 | 2.611 | -70 | 960 | 2.418 |
| Aðrar inntøkur | 430 | 716 | 861 | 1.173 | 936 |
| **Inntøkur íalt** | **34.913** | **35.729** | **34.037** | **36.399** | **38.540** |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 26.568 | 25.640 | 26.029 | 26.789 | 26.213 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | 282 | 480 | 1.815 | 2.433 | 5.230 |
| **Útreiðslur íalt** | **26.850** | **26.120** | **27.844** | **29.222** | **31.443** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **8.063** | **9.609** | **6.193** | **7.177** | **7.097** |
| Skattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 13 |
| **Úrslit** | **8.063** | **9.609** | **6.193** | **7.177** | **7.084** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.735.089 | 1.645.581 | 1.546.546 | 1.509.603 | 1.517.927 |
| Virðisbrøv | 524.199 | 476.645 | 221.954 | 207.316 | 191.764 |
| Innlán | 2.186.545 | 2.040.194 | 1.868.966 | 1.767.577 | 1.629.931 |
| Javni | 2.451.381 | 2.286.258 | 2.104.188 | 2.012.538 | 1.893.149 |
| Eginpeningur | 217.788 | 203.612 | 184.320 | 169.082 | 162.039 |
| Ábyrgdir | 59.313 | 69.507 | 52.760 | 49.769 | 43.050 |

# Notur

| Nota | | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 11 | 0 |
| | Útlan | 31.975 | 33.095 |
| | Lánsbrøv | 987 | 1.048 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **32.973** | **34.143** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 119 | 44 |
| | Innlán | 2.224 | 4.408 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 1.026 | 1.031 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **3.369** | **5.483** |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 13 | 19 |
| | Gjaldstænastur | 1.049 | 1.087 |
| | Lánisakskostnaður | 1.753 | 1.307 |
| | Provisión av ábyrgdum | 543 | 704 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 629 | 880 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **3.987** | **3.997** |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 995 | 2.705 |
| | Partabrøv | 111 | -113 |
| | Gjaldoyra | 61 | 19 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **1.167** | **2.611** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.065 | 1.042 |
| | Nevnd | 482 | 400 |
| | Umboðsráð | 83 | 79 |
| | **Tilsamans** | **1.630** | **1.521** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 10.039 | 9.814 |
| | Eftirløn | 1.733 | 1.687 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 1.980 | 1.898 |
| | **Tilsamans** | **13.752** | **13.399** |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 10.453 | 10.029 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **25.835** | **24.949** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 42,7 | 42,7 |

# Notur

| Nota | | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 27.144 | 31.765 | 31.765 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 3.053 | 2.065 | 8.579 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -1.719 | -2.622 | -6.742 |
| | Avskrivað (staðfest tap) | 0 | -2.066 | -6.458 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar tilsamans** | **28.478** | **29.142** | **27.144** |
| | Niðurskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 82.066 | 93.966 | 90.878 |
| | Individuellar niðurskrivingar tilsamans | -28.478 | -29.142 | -27.144 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **53.588** | **64.824** | **63.734** |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 5.902 | 5.715 | 5.715 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 958 | 366 | 1.237 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -1.977 | -552 | -1.050 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar tilsamans** | **4.883** | **5.529** | **5.902** |
| | Niðuskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 1.686.384 | 1.586.286 | 1.636.378 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar tilsamans | -4.883 | -5.529 | -5.902 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **1.681.501** | **1.580.757** | **1.630.476** |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **33.361** | **34.671** | **33.046** |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 93 | 93 | 93 |
| | Burturleggingar í árinum | 0 | 0 | 0 |
| | Afturførdar burturleggingar | 0 | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir tilsamans** | **93** | **93** | **93** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **33.454** | **34.764** | **33.139** |

# Notur

| Nota | | 1H 2017<br>1.000 DKK | 1H 2016<br>1.000 DKK | 2016<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán (framhald)** | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | 1.334 | -557 | 1.837 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | 0 | 0 | 0 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | -1.019 | -186 | 187 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -802 | -604 | -1.396 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 413 | 322 | 1.185 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -24 | -117 | -134 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 380 | 1.622 | 1.621 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **282** | **480** | **3.300** |
| 7 | **Lánsbrøv** | | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagsvirði | 507.144 | 455.003 | 462.048 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 5.010 | 10.121 | 10.053 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **512.154** | **465.124** | **472.101** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 22 | 107 | 61 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **512.176** | **465.231** | **472.162** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 6.564 | 6.414 | 8.219 |
| | Tapsábyrgdir | 9.044 | 7.460 | 8.225 |
| | Aðrar skyldir | 43.705 | 55.633 | 48.519 |
| | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan tilsamans** | **59.313** | **69.507** | **64.963** |

www.ns.fo